# ARROGANSA mótvegis ekstremismu bar Svøríkisdemokratar á ting

**Sviar eru skakaðir eftir ríkisdagsvalið sunnudagin, tá tað eydnaðist víðgongdu Svøríkisdemokratunum at fáa 20 sessir í ríkisdegnum. Tolsama svenska fólkaheimið er ikki so tolsamt meira, men gomlu flokkarnir kunnu takka sær sjálvum fyri, at soleiðis gekk, halda samfelagsfrøðingarnir, Jóanes N. Dalsgaard og Sámal Matras Kristiansen, tí teir gomlu flokkarnir róku láglønt og arbeiðsleys yvir í Svøríkisdemokratarnar**

Uni Arge

Sunnukvøldið, tá úrslitið av svenska ríkisdagsvalinum fyrilá, og greitt var, at Svøríkisdemokratarnir høvdu vunnið 20 sessir í ríkisdegnum, skrivaði 17 ára gamla Felicia Margineanu á Facebook, at nú máttu fólk fara á gøturnar at mótmæla. Túsundtals fólk søgdu seg taka undir við henni, og mánakvøldið kl. 18.00 helt hon røðu fyri 10.000 fólkum á Sergels torginum í Stokkhólmi, har hon bað øll steðga rasismuni í Svøríki.

So skakkir eru sviar eftir, at hvørki borgarligi ella sosialdemokratiski vongurin fingu meirilutan á valinum, tí Svøríkisdemokratarnir komu á ting, at teir nú mótmæla einum lógliga valdum flokki. Svøríkisdemokratarnir fingu heili 5,7 prosent av atkvøðunum og settu gomlu flokkarnar í júst ta støðu, teir mest av øllum vildu sleppa undan at enda í. Innflytarafíggindaligi flokkurin gjørdist tungan á vágskálini.

Borgarliga stjórnin hjá Fredrik Reinfeldt má nú fríggja til Umhvørvisflokkin fyri at fáa meiriluta, og møguliga má hon alla leiðina til Sosialdemokratarnar at vinna sær stuðul, bara so Svøríkisdemokratarnir ikki skulu sleppa fram at valdinum. Nýggi flokkurin í ríkisdegnum er rætt og slætt ikki stovureinur politiskt, men at hann er vorðin veruleiki, kunnu flokkar sum Moderatarna hjá Fredrik Reinfeldt og Sosialdemokratarnir hjá Monu Sahlin takka sær sjálvum fyri.

### Ófaklærd og arbeiðsleys

Tað halda ið hvussu er føroysku samfelagsfrøðingarnir, Jóanes N. Dalsgaard og Sámal Matras Kristiansen. Jóanes N. Dalsgaard heldur, at gomlu flokkarnir í Svøríki vóru arrogantir mótvegis Svøríkisdemokratunum í valstríðnum, og hetta gav uttan iva nýggja flokkinum viðvind undan valinum. Serliga veljarar, ið eru sosialt illa fyri og kenna seg marginaliseraðar í samfelagnum, hava valt flokkin, heldur hann.

– Eg kundi hugsað mær, at stórur partur av veljarunum hjá Svøríkisdemokratunum eru ófaklærdir løntakarar og arbeiðsleys. Hetta eru veljarar, sum traditionelt hava



*Jimmi Åkeson úr Svøríkisdemokratunum. Ongin av hinum flokkunum vil geva honum politiska ávirkan*

verið sosialdemokratar, men sum kenna seg sviknar av teirri sosialdemokratisku akademiseringini. Hetta er tað, vit hava sæð í sambandi við Dansk Folkeparti í Danmark, og eg giti, at tað sama ger seg galdandi fyri Svøríkisdemokratarnar, sigur Jóanes N. Dalsgaard.

Sámal Matras Kristansen heldur tað ikki vera løgið, at Svøríkisdemokratarnir fingu sítt gjøgnumbrot nú, tí sama víðgongda rák hevur verið at sæð í nógvum evropeiskum londum. At gjøgnumbrotið ikki kom fyrr enn nú, kann standast av, at tinggátin í Svøríki er lutfalsliga høg. Svøríkisdemokratarnir vóru stutt frá at koma í ríkisdagin longu í 2006, og tá vunnu teir sær rættin at fáa floksstuðul. Hetta hevur heilt vist verið ein fyrimunur á valinum hesaferð, heldur Sámal Matras Kristiansen.

– Úrslitið vísir, at gomlu flokkarnir hava mist nógvar av sínum veljarum. Serliga tey lágútbúnu og arbeiðsleysu velja Svøríkisdemokratarnar, og tað kemst av, at hesi kenna á sín kropp, at innflytarar leggja trýst á arbeiðsmarknaðin og vælferðartænasturnar. Svøríki hevur havt ein lagaligan innflytarapolitikk, og nógv ræðast, at innflytarar skulu oyðileggja svenska fólkaheimið, sigur Sámal Matras Kristiansen.

### Umdømið skalað

Svøríki hevur sostatt eins og Danmark fingið ein politiskan flokk, sum ber orð fyri at vera fremmandafíggindaligur, og spurningurin er, hvussu hetta fer at ávirka umdømið hjá Norðurlondum, ið jú eru høgt í metum kring allan heim, ikki minst fyri sítt frísinni og tolsemi. Jóanes N. Dalsgaard heldur ikki, at myndin av Norðurlondum fer at broytast stórvegis.

– Ekstremisman hevur framvegis trong kor bæði í Danmark og Svøríki. Sama rák sum í Svøríki og Danmark ger seg galdandi við nógv størri styrki aðrastaðni í Evropa. Trupulleikin hjá ekstremistunum í Norðurlondum er, at teir eru ikki í nánd av stjórnarvaldinum. Til tess hava teir ov lítla undirtøku. Skal hetta broytast, má fara fram ein avgerandi mentanarlig broyting í Norðurlondum, og hana haldi eg ikki, vit síggja tekin um, sigur hann.

Sámal Matras Kristiansen vísir á, at víðgongda nationalistiska rákið í Norðurlondum samsvarar væl við rákið í Hollandi, Belgia, Eysturríki, Sveis og eysturevropeisku londunum, ið hann kallar ekstremt nationalpopulistisk. Norðurlond fylgja bara við í tí yvirskipaða rákinum, og tí eru ikki ábendingar um, at Norðurlond eru ella verða so nógv øðrvísi enn onnur evropeisk lond.

– Púra vist er kortini, at hendan gongdin er ein smeitur fyri sjálvtilvitanina hjá teimum væl bjargaðu norðurlendingunum, ið framvegis halda seg liva í tolerantum og vinarligum samfeløgum, staðfestir Sámal Matras Kristiansen.

### Ikki bannast

Í svenska valstríðnum hava mong kallað Svøríkisdemokratarnar rasistiskar, og somu herróp hava verið nýtt um Danska Fólkaflokkin. Mótmælisgongurnar í Svøríki mánakvøldið høvdu eisini sum beinleiðis mál at steðga rasismuni í Svøríki, og spurningurin er tí, um ein flokkur sum Svøríkisdemokratarnir hevur nakran veruligan tilverurætt. Tað hevur hann avgjørt, heldur Jóanes N. Dalsgaard.

– Sjálvandi hava Svøríkisdemokratarnir tilverurætt, so leingi fólk velja teir, og so leingi teir ikki niðurlaga demokratiið. Veruligi vandin við víðgongdu flokkunum er ikki tann ekstremisma, teir leggja fyri dagin, men tann líkasæla og arrogansa, sum restin av samfelagnum vísir mótvegis ekstremismuni, sigur hann.

Sámal Matras Kristiansen heldur, at tað hevði verið ódemokratiskt, um bann varð sett fyri Svøríkisdemokratunum, hóast flokkurin ber orð fyri at vera rasistiskur. Heldur er neyðugt at hyggja at, hvussu ein tílíkur flokkur kann fáa so stóra undirtøku.

– Neyðugt er at taka trupulleikarnar hjá teimum undirpriviligeraðu veljarunum serisøst, tí tað eru hesir veljararnir, ið serliga velja nationalpopulistiskar flokkar. Hetta er serliga ein trupulleiki hjá sosialdemokratisku flokkunum. Eftir fyrra og serliga seinna heimsbardaga vóru tað sosialdemokratarnir, ið megnaðu av geva teimum minni mentu eina vón um nakað betri, ið var eitt alternativ til afturlítandi nationalismuna. Nú hava tey undirpriviligeraðu mist álitið á yuppie-sosialistunum, og so fara tey aftur til nationalismuna, sigur Sámal Matras Kristiansen.

## Fakta

**Í svenska ríkisdegnum eru 349 sessir. Á valinum sunnudagin fekk borgarliga stjórnin 172 sessir og vinstravongurin 157 sessir. Hvørgin vongurin fekk tí avgjørdan meiriluta. Svøríkisdemokratarnir fingu á fyrsta sinni sæti í ríkisdegnum við 20 sessum. Hevði borgarligi vongurin fingið bara tríggjar av sessunum hjá nýggja flokkinum, hevði hann varðveitt meirilutan. Fínteljingin kann tó broyta úrslitið.**